# Ársfrágreiðing fyri 2006

## Endamálið

Vinnuframagrunnurin varð settur á stovn sambært løgtingslóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um vinnuframagrunn. Endamálið við Vinnuframagrunninum er, at hann skal stuðla vinnuni í avmarkaðan mun – uttan at veita rakstrar- og íløgustuðul. Grunnurin stuðlar tiltøkum, sum fjøltátta vinnulívið og økja um nýtsluna av vitan.

Kunngerð um virksemi og umsiting hjá Vinnuframagrunninum varð lýst 29. november 2001, har landsstýrismaðurin í vinnumálum – samsvarandi vinnupolitikki Landsstýrisins – staðfestir tey vinnugreinaøki, sum serligur dentur skal leggjast á at stuðla.

Umframt omanfyri nevnda virksemi umsitur Vinnuframagrunnurin eisini stuðulsskipan til skipasmíð.

## Árið 2006

Rentuinntøkurnar vóru 1.452.000 krónur í 2006 móti 1.023.000 krónum í 2005.

Vinnuframagrunnurin hevur í 2006 viðgjørt 34 umsóknir, harav 28 umsóknir vóru játtaðar. Í stuðli vóru veittar 6.770.000 krónur brutto, meðan 1.193.000 krónur eru afturførdar. Nettostuðulin var sostatt 5.577.000 krónur.

Eginognin við árslok var 49.277.000 krónur, herav er stovnsfæið 42.858.000 krónur.

Við árslok 2006 er skyldugur stuðul 3.406.000 krónur.




| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vinnuframaátøk | 2.722 | 1.672 | 1.605 | 1.100 | 2.200 | 9.299 |
| Menning | 643 | 158 | 809 | 1.561 | 2.747 | 5.918 |
| Marknaðarføring | 3.611 | 4.567 | 2.487 | 2.000 | 1.734 | 14.399 |
| Aðrar | 788 | 100 | 291 | 38 | 90 | 1.307 |
| | **7.764** | **6.497** | **5.192** | **4.699** | **6.771** | **30.923** |

